# Í hvønn krók á Norðurlandinum

**Spennandi bussferð við staðkendum ferðaleiðara í vøkru náttúruni í Íslandi á hásumri, tá ongantíð verður myrkt**

ÍSLANDSFERÐ

Um mánaðaskiftið juni-juli í ár verður ein spennandi bussferð um Norðurlandið í Íslandi.

Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri, og ferðaleiðari verður svenska Nanna Hermansson, sum tosar føroyskt, og ofta hevur skipað fyri ferðum á júst hesum leiðum.

Farið verður við Norrønu á Seyðisfjørðin mikudagin 27. juni og ferðalagið verður aftur í Havn fríggjadagin 6. juli.

Nógv støð verða vitjað, millum annað Løgurinn, Hálslón, Kárahnjúkar, har sum nógv umstrídda byrgingin er gjørd, Skriðuklaustur, Hallormstaður, Egilsstaðir, Dettifossur, Ásbyrgi, Húsavík, Akureyri, Ólafsfjørður, Siglufjørður, Hólar, Hófsós, Skagafjørður, Sauðárkrókur, Tindastóll, Varmahlíð, Varmalækur og Seyðisfjørður.

Vitjað verður á søvnum, millum annað sildasavninum og á fólkalagastovninum á Siglufirði, listasavninum á Akureyri, bygdasavninum í Skagafjørðinum.

Og hestasýning verður í Varmalæk.

Og fyri ikki at tosa um vøkru náttúruna og ljósu næturnar. Ljóst er alt samdøgrið.

Harafturat er møguleiki at svimja hvønn dag.

Av tí at ferðaleiðarin kennir nógv fólk á støðunum, vitjað verða, fær ferðalagið fleiri upplivingar enn onnur, sum ferðast á hesum leiðum.

## Longd freist at tekna seg til Ung í Føroyum Eystur og Suður

Tann 23. og 24. mars verður Ung í Føroyum Eystur hildin á øðrum sinni. Fyrru ferð var í Fuglafirði í 2005. Hesaferð er Runavík karmur um stevnuna.

Tann 30. mars – 1. apríl verður Ung í Føroyum á fyrsta sinni hildin í Suðri. Tað verður í Vági og allar kommunurnar í Suðri samstarva um hesa stevnu, ið verður um ikki eins stór, so eins long og ein av UíF-stevnunum, sum plaga at vera hildnar í Havn.

Heilt fitt av tekningum eru komnar inn til stevnurnar báðar, men enn eru tær ikki fullteknaðar. Tí verður freistin longd til fríggjadagin 16. mars.

Tey, sum longu hava tekna seg, kunnu tí øll rokna við at fáa bræv um, at tey eru sloppin við.

Tekningarskjøl og fleiri upplýsingar eru at fáa at heimasíðuni HYPERLINK "http://www.ungiforoyum.INFO" www.ungiforoyum.INFO

# ADRA seldi 23 hús leygar-kvøldið

**Konsertirnar við Ettu Cameron vóru til frama fyri aftur-vend flótta-fólk í Kongo. Føroy-ingar hava møguleika at keypa eini hús í Kongo til flótta-fólkini fyri einans 3.200 krónur**

STUÐULSKONSERT

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Tað var hjálparfelagsskapurin ADRA, sum skipaði fyri konsertunum við Ettu Cameron leygarkvøldið og sunnukvøldið.

Alt yvirskotið fer til at keypa hús í Kongo til afturvend flóttafólk. Umstøðurnar í Kongo hava leingi verið ótolandi, og tí rýmdi nógv av landinum fyri nógvum árum síðani. Nú byrja hesi fólkini tó at venda aftur, men tey hava einki hús at koma heim til. Hesum ynskir ADRA at hjálpa við.

- Konsertin í Norðurlandahúsinum gekk sera væl, og vit seldu heili 23 hús hetta kvøldið, um-framt at vit savnaðu 15.000 krónur inn. Sunnukvøldið savnaðu vit eisini nógv inn, og vit seldu eisini nøkur hús, men eg veit ikki júst hvussu nógv, segði ein umboðsmaður fyri ADRA eftir konsertina sunnu-kvøldið.

Áhoyrararnir til konsertirnar hjá Ettu høvdu møguleika til at keypa eitt hús í Kongo til afturvendu flóttafólkini fyri einans 3.200 krónur. Keyparin sleppur sjálvur at gera av, hvussu húsið skal eita.

ADRA móttekur nógvan stuðul frá DANIDA, sum er menningarhjálpargrunnurin hjá danska statinum. ADRA er við í nógvum verkætlanum kring heimin. ADRA er bygt uppá tað kristna grundarlagið, og tað hevur verið tætt knýtt at adventistakirkjuni. Nú er tað tó ein sjálvstøðugur felagsskapur, og teir vilja hjálpa uttan mun til, hvørji fólkini eru, og hvørja trúgv, tey hava.


## Aðalfundur í Norðstreymoyar Javnaðarfelag

verður í hølunum hjá Kollafjarðar bjargingarfelag **sunnukvøldið 18. mars kl. 19.**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

***Norðstreymoyar Javnaðarfelag***

www.sosialurin.fo

# Kyndil 50 ár

Í sambandi við at bókin um Kyndil kemur út 16. mars, er tiltak í Miðlahúsinum

**fríggjadagin 16. mars kl. 16.00**

har høvið er at heilsa uppá rithøvundan, Suna Merkistein.

- Bókin fæst til keyps fyri **kr. 399,-**
- Regin Jacobsen spælur Kyndils-løg

***Øll eru vælkomin***







Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

# NANTONG



OKKARA VÆLUMTÓKTA KVØLD-BUFFET BYRJAR NÚ AFTUR

Eisini ber til at bíleggja úr okkara fjølbroyttu matarskrá.
Bíleggjast kann eisini út av húsinum

KOSTNAÐUR VAKSIN 175,-
BØRN 55,-



NANTONG
TEL 318698 - 218668

Sosialurin 341800